

# ANDLÁT

Vegleiðing um praktisk viðurskifti í sambandi við andlát

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS

Innihaldið í hesum faldaranum
er dagført 21/04/2022

Tú skalt seta teg í samband við deildarleiðaran á seingjadeildini tlf. 34 33 00 helst millum kl. 8 og 15.

## KISTA OG LÍKKLÆÐIR

Kista og líkklæðir verða bíløgd av avvarðandi.

## KISTUVEITARAR

Suðuroy:
Eilif Dimon tlf. 26 66 15
verk@mail.fo

Streymoy og meginøkið:
Sólsetur tlf. 35 36 37/29 90 00
www.solsetur.fo

Gravarhjálp v/Hermann
Eysturoy tlf. 51 17 23
www.gravarhjalp.fo

Seinasta heilsan v/Halaldur S.
Hammer tlf. 51 30 70
www.sh.fo

Norðoyggjar:
Eiler Jacobsen
tlf. 21 64 82/45 64 82
eilerj@olivant.fo

Vágar:
Sandavágs Timburhandil
tlf. 33 27 00
timbur@timbur.fo

Verður kistan bíløgd norðanfjørðs, mást tú koyra kistuna av Krambatanga til sjúkrahúsið, ella har farið verður frá.

## GRAVARHJÁLP

Heilsutrygd veitir gravarhjálp smb. umsókn, tó í mesta lagi kr. 5.000.
Sí www.heilsutrygd.fo

Umsókn og kvittan skulu sendast til:

Heilsutrygd
Klaksvíksvegur 7
700 Klaksvík

## LÝSING UM ANDLÁT

Vilt tú lýsa andlátið, fráferðina úr kapellinum og jarðarferðina í útvarpinum, verður hetta fráboðað teimum.
Vanligt er at lýsa, tá tey nærmastu hava fingið boðini, og allar avtalur eru gjørdar.

Útvarpið tlf. 34 75 00 ella andlat@kvf.fo

## FRÁFERÐ ÚR KAPELLINUM OG JARÐARFERÐ

Tú skalt tosa við prest ella onkran í samkomuni um fráferð úr kapellinum og jarðarferðina.
Eisini kanst tú tosa um talu, ið skal haldast, sangir o.a.

Spyr prest um klokkara og organist.

## NÆR VERÐUR LAGT Í KISTU

Sama dag, sum farið verður úr kapellinum, verður tann deyði lagdur í kistuna.
Avvarðandi kunnu vera við at leggja í kistuna, um ynski er um tað.

Deildarleiðarin skal hava boð um, nær lokið skal leggjast á og nær farið verður úr kapellinum.

Ynskir tú at síggja tann deyða, er best, at tú kemur um dagin.

Sigið deildarleiðaranum frá, áðrenn komið verður á sjúkrahúsið.

## EGIN KLÆÐIR

Ynskir tú, at tann deyði skal í egin klæðir, eru tit vælkomin at koma við klæðum.

## BØRUBUKET

Børubukett verður bíløgd av avvarðandi.

## LÍKBILUR

Líkbilur skal bíleggjast at koyra úr kapellinum og tiljarðarferðina.

Líkbilurin hjá Tvøroyrar Býráð kann bíleggjast á tlf. 57 99 26, 220926 ella 61 10 85.

Kommunurnar gjalda líkbilin.

## BERARAR

Vanligt er, at 6 berarar eru til kistuna uttan so, at onnur avtala er gjørd, tá kistan er bíløgd.

## GRAVARI

Set teg í samband við gravaran so skjótt sum til ber. Er kistan longri alla breiðari enn vanligt, skal gravarin hava boð um hetta.
Kommunan vísir á, hvør gravarin er.

## SANGARAR

Í kirkjum og samkomum eru sangarar.
Avvarðandi mugu spyrja seg fyri har, hvørjir hesir eru og síðan seta seg í samband við teir.

## ERV

Erv er tað nøkur sum halda í heiminum hjá tí, ið er deyður, hjá
avvarðandi, á matstovumella í bygdar- & samkomuhúsum.

## FRÁBOÐAN

Sjúkrahúsið boðar myndug-leikunum og skiftirættinum frá andlátinum.



*Við samkenslu*